# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Pensjónsaldur og valmøguleikar

Pensjónsaldurin er av álvara komin á politisku dagskránna, nú spurningurin um mótrokningar í fyritíðarpensjón og fólkapensjón er tvinnaðaur saman við ólavsøkupakkan. Henda samanblanding er óheppin og hevur gruggað allan pensjónsspurningin, eitt nú tí pilkað verður við aktuellu skattingarreglurnar hjá fólka- og fyritíðarpensjonistum og reglurnar um mótrokning av øðrum inntøkum skulu skerpast. Tað er bæði skeivt og óklókt at koma við slíkum broytingum, áðrenn embætismannauppskotið um okkara framtíðarpensjónskipan hevur fingið neyðturviliga politiska viðgerð. Vit kundu lagt afturat, at henda politiska viðgerð sjálvsagt eisini fevnir um viðgerð hjá viðkomandi yrkisfeløgum og áhugafelagskapum.

Sum sagt hevur ABC2 tvinnað framtíðar pensjónsspurningin uppí ólavsøkupakkan. Tað er ikki ov nógv sagt, at henda samantvinnan hevur órógvað alt málið um framtíðar pensjónskipanina og henda samantvinnan eigur at halda uppat t.d. við, at spurningurin um mótrokningarnar verður tikin úr ólavsøkupakkanum og loystur har hesin spurnigur hoyrir heima nevniliga í málinum um framtíðar pensjónsskipan føroyinga.

Í øllum rokinum um ólavsøkupakkan er spurningurin um pensjónsaldurin so eisini vorðin eitt heitt evni, og eitt politiskt orðaskifti hevur tikið seg upp í fjølmiðlunum. Hetta kann bert vera gott og gagnligt fyri málið, soleingi tjakararnir hava í huga, at hesin spurningur heldur ikki hoyrir heima í ólavsøkupakkanum, men at spurningurin eigur at verða loystur í sambandi við loysnina av eini framtíðar pensjónskipan.

Nógv hava fingið ta fatan, at pensjónsaldurin her og nú skal flytast til 71 ár. Hetta stendst sum vit longu hava víst á av tí vanlukku samanblanding av einum embætismannauppskoti um okkara framtíðar pensjónskipan og ólavsøkupkakkanum. Av hesum stendst harður dráttur og Samtak, sum tykist vera einasti verji teirra lágløntu og sum íðuliga talar søk teirra, ið onga aðra pensjón hava enn fólkapensjón, er hart ímóti at hækka pensjónsaldurin. Hinvegin hevur fráfarni heilsumálaráðharrin, Hans Pauli Strøm, ið eisini hevur royndur sum landsstýrismaður í almannamálum, mælt til eina skipan við valmøguleikum.

Hetta er eins skilagott og tað er sjálvsagt. Nógv eru útslitin longu um seksti ára aldur, meðan onnur eru við sítt fríska lív heilt upp í sjeyti- og áttatiárini. Hetta hevur nakað við heilsu og við arbeiðslív at gera. Ein komandi nýggj pensjónskipan eigur tí at fevna um valmøguleikar: tann, sum ynskir at sleppa frá við seksti, seksti fimm ella seksti sjey ára aldur, eigur at kunna fáa hanna ynskið eftirlíkað. Tann, ið hevur hug, megi og mátt at halda fram á arbeiðsmarknaðinum longur upp í árini eigur at hava henda møguleika uttan at verða revsaður fíggjarliga. Soleiðis verður gjørt í nógvum vælferðarsamfeløgum, og eiga vit tí at umhugsa eina skipan framtíðar pensjónskipan við valmøguleikum við atliti at fráfaringaraldri.

**Sosialurin**

## Hevur hann ikki kálvahjarta, so svav hann!

ANNITA Á FRÍÐRIKSMØRK



Í 8 mánaðir stríddust tey við pakkan.

ólavsøkupakkan.

Meðan vit bíðjaðu fingu vit at vita, at tað skortaði ikki við hugskotum, - trupulleikin var at finna semjur.

Tað var semjan, kompromiið, konsensusið, sum var tað, sum tók tíð.

Og vit bíðjaðu og vit bíðjaðu.

Og so endiliga nú fekk andstøðan fundarboð. Og tað fekk hon tríggjar ferðir. Á fundunum vísti landsstýrið á, hvussu umráðandi tað var, at alt politiska spektrið var við. M.a. fyri, at umdømið Føroya úteftir skuldi mennast.

Og tað var øgiliga umráðandi, at andstøðan var við uppá semjuna. Vit fingu eisini at vita frá Jóannesi Eidesgaard sjálvum, at tað var øll samgongan, og alt landsstýrið sum stóð aftanfyri listan av átøkum, sum fóru at koma í ólavsøkupakkan. Og listin, sum vit har fingu borðreiddan var mikið longri og kontroversiellur enn hann, sum varð lagdur fyri løgtingið á ólavsøku.

Okkara íkast til kjakið harúti legði dent á, at skuldu vit verða við, so skuldi pakkin

· javna byrðarnar í samfelagnum
· virða sáttmálarnar á arbeiðsmarknaðinum
· styrkja tey lágløntu og meðalløntu
· tryggja íløguvirksemi í øllum økjunum í landinum
· taka hædd fyri at handverkaravinnan var hótt
· menna útbúgving, gransking og mentan
· menna vinnulívið.

Táið triðji fundurin við andstøðuna var liðugur fingu vit at vita, at fundarboð komu vikuna eftir.

Vikan kom, men ongi fundarboð.

**Andstøðan var droppað**

So kom ólavsøkan, og pakkin, sum øll høvdu bíðjað eftir. Men har var bara onki eftir.. Tað einasta kontroversiella, sum samgongan við Javnaðarflokkinum á odda var samd um, var at degradera pensjonistar og fyritíðarpensjonistar. Restin var ein listi yvir frammanundan samtykt mál.

Og ikki óvæntað, so komu reaksjónirnar. Søgur um at trúgvir limir melda seg úr Javnaðarflokkinum gongur sum rótasúpan, prominentir limir samanbera formannin og tingmanningina við lík.

So her stendur á gomlum nøglum. Og tá eru sum verða mann, góð ráð dýr!

Hvat ger Javnaðarflokkurin. Jú, hann sendir fyrst Hans Paula Strøm út eftir mikrofonuni. Og nú kætnar: endiliga ein føroyskur Auken, endiliga ein Petur Mohr Dam (sum fleiri javnaðarveljarar framvegis velja, tá teir seta kross við Javnaðarflokkin)

HPS sigur nú, at hann tekur als ikki undir við hasum, sum stendur í pakkanum um pensjónir. Hetta sigur hann éin mánað eftir, at hann sum landsstýrismaður blástemplaði allan pakkan.

Jú, sigur Jóannes Eidesgaard. Talan er um eina semju.

Og sum um at tað ikki var nóg mikið, men so kemur tíðindaskriv frá allari javnaðartingmanningini, sum sigur seg heldur ikki taka undir við tí partinum av pakkanum sum snýr seg um pensjónir.

Í fyrstu atløgu gert formaður floksins, sum jú er Faðirin at uppskotinum, firtin. Um tað er tað sum tingmanningin vil, so má hon sjálv eisini koma við einum alternativi! eru greiðu boðini til sín egna flokk. Men tá so onkur hevur fortalt JE, hvat tað merkir fyri Flokkin um hann soleiðis fer eftir pensjonistunum, so fær pípan hjá honum bráddliga annað ljóð. Tað sum hann í pakkanum biðir Løgtingið taka undir við, er ikki tað, sum hann vil, sigur hann. Nei, nei. Hatta er bara nakað sum ein embætismannabólkur hevur arbeitt við. Hatta er ikki nakað sum Javnaðarflokkurin tekur undir við. Ert tú galin!

Hvar er nú semjan, kompromiið, konsensusið, sum var tað sum tók, tíð blivið av. Og tað sum stendur í ólavsøkupakkanum er tað eitt hugskotskattalog, ein brain-storm ella er pakkin eitt uppskot til samtyktar? Tað tekur ikki 8 mánaðir at koma við einum hugskotskattalogið. Tað tekur ein fyrrapart. Men tað kann gott taka 8 mánaðir at verða samd um eitt uppskotið til samtyktar.

Tað tók Jóannes Ejdesgaard, Hans Paula Strøm, John Johannessen og øllum hinum í samgonguni 8 mánaðir at blíva samd um ólavsøkupakkan. Eisini um tann partin, sum snýr seg um pensjónir og fyritiðarpensjónir!

Um onkur svav meðan arbeitt varð ella um viðkomandi nú fekk kálvahjarta, kunnu vit bara gita um.

...

Alt hetta fær tankarnar 5 ár aftur í tíð.

í 2004 stóð Jóannes Ejdesgaard á odda fyri einari visjón 2015. Tá setti hann sambært heimasíðuni www.visjon2015.fo 140 fólk (nei, eg lúgvi ikki: 140 fólk!) í 13 ymiskar strategibólkar at arbeiða í samfull 4 ár við ætlanini um, at gera Føroyar til eitt av heimsins bestu londum at búgva í .

Í dag torir sami maður og Flokkur ikki at taka hesa"visjón" uppá orðið.

Og trúgv mær. Tey verða (og eru nokk longu) líka flov av ólavsøkupakkanum, sum tey vórðu av visjón 2015.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13:30

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.